MIÐVIKAN

Oljuaðalstjóri við føroyingar í London:

# Enn nógv spurnartekin – basaltknú

**Neyðugt er at økja um samlaða forstáilsi av jarðfrøðini og olju-potentialinum í einum øki, og tað er neyðugt, at feløgini, sum eru virkin á føroyska landgrunninum, samstarva, býta um upplýsingar, um data og hava innlit í data hjá hvørjum øðrum, soleiðis at samlaða vitanin verður økt, og øll kunnu flyta seg framá við felags vitan**

ÚTISETAR OG OLJA
*Jan Müller*

Stórur áhugi er millum føroyingar í útlandinum, hvussu gongst við ætlanunum at gera Føroyar til eina virkna oljutjóð. Hetta vísti stóra luttøkan á Føroyakvøldinum í London nú um dagarnar. Herálvur Joensen, aðalstjóri greiddi frá leitingini higartil. Hann vísti á, at sjálvt um olja er staðfest og entá í rímuligum nøgdum, so hevur man enn ikki staðfest, at reservoirkvalitetur oa. er av slíkum slag, at man torir at siga, at hetta er nakað, sum fer at verða framleitt. Tað eru enn nógv spurnartekin og skal tað gerast munandi meira arbeiði, áðrenn man kemur til eina endaliga støðutakan.

Neyðugt er at økja um samlaða forstáilsi av jarðfrøðini og oljupotentialinum í einum øki, og tað er neyðugt, at feløgini, sum eru virkin á føroyska landgrunninum, samstarva, býta um upplýsingar, um data og hava innlit í data hjá hvørjum øðrum, soleiðis at samlaða vitanin verður økt, og øll kunnu flyta seg framá við felags vitan.

Herálvur segði eisini, at tað man hevði fingið burtur úr fyrstu kanningunum er, at man kann ikki avskriva ávís jarðfrøðilig niveau frammanundan. Tað er eingin ivi um, at øll feløgini fóru til arbeiðis út frá einum ávísum hugsanarhátti. Tey høvdu verið virkin eystan fyri Hetland og har arbeiddu tey út frá ávísum metingum og veruleikum, sum tey so eisini hildu seg skula fara eftir á føroyskum øki. Tað vísti seg, at tað var kanska ikki júst tað. Tað vísti seg at vera torført at finna dekklag, sum kundi halda uppá oljuna, og tí var tað rætt at hyggja eftir strukturum, sum liggja djúpri, og tað vóru eisini teir, sum goymdu olju. Men tað kann gott vera, at grynri løg heilt aðrastaðni á landgrunninum fara at rigga, td. inni á basaltøkinum segði aðalstjórin.

- Vit verða noydd at hava í huga, at tað her á markinum hendir eitt ella annað. Jarðfrøðin broytist, og tí mugu vit ikki bara eygleiða føroyska økið sum eitt framhald av tí, sum er eystan fyri Hetland.

Hetta er so vitanin vit hava nú, og hesa vitan hevur Agip, sum fer at bora í summar. Og teir brúka sjálvandi hesa vitan í síni tilrættalegging. Sjálvt um tað økið og tann strukturin teir skulu bora í í mangar mátar líkist tí, sum BP boraði í - og har tað nettupp var ein trupulleiki við manglandi segli, sum kundi halda oljuni aftur - metir Agip í hvussu er, at

*Framhald á síðu 15*



# ChevronTexaco bora 3 kilometrar frá markinum í apríl

OLJUBORING
*Jan Müller*

Fyrst í apríl mánað fer amerikanski oljurisin ChevronTexaco undir sína fyrstu oljuboring á Atlantsmótinum í mong ár. Frá tíðindakvinnuni hjá feløgnum í Bretlandi frætta vit, at brunnurin verður boraður 3 kilometrar frá føroyska markinum. Hon sigur, at stórur spenningur er um boringina og fer hon eisini at hava stóran týdning fyri víðari arbeiðið hjá feløgnum í hesum stóra økinum í framtíðini. Felagið hevur bundið seg til at bora enn ein brunn í hesum lisensinum 204/17, men tað er ikki avgjørt, nær hann verður boraður.

ChevronTexaco, sum er ein gamal kenningur á føroyska økinum, fekk fleiri týðandi teigar í 19. útbjóðingini á bretska landgrunninum nøkur ár herfyri. Hesir teigar liggja allir tætt upp at føroyska markinum, og hetta er so fyrsti av brunnunum, sum felagið fer at bora. Projektið verður kallað "Fleet North" og kundi merkt, at tað er bert eitt av málunum hjá "Norðurflotanum" hjá ChevronTexaco.



*West Navion, sum um ein mánað fer undir enn eina týðandi boring við markið. Hetta er tann fjórða boringin hjá West Navion á Atlantsmótinum uppá tvey ár. Hinir tríggir brunnarnir ein á føroyskum øki og tveir á bretskum fyri BP og Amerada Hess hava ikki givið tey úrslit, sum man hevði vónað. Nú sleppur manningin á hesum heimsins mest framkomna boriskipi at royna eydnuna fyri fjórðu ferð á Atlantsmótinum*

Tað áhugverda við hesi boringini er, at hon liggur mitt ímillum verandi oljufelt á bretskum øki og so brunnin, sum Agip fer at bora í juni. Taka vit framleiðandi feltini bretsku megin markið og møgulig onnur fund eisini og so mest áhugaverdu økini á føroyska landgrunninum, so liggur brunnurin hjá ChevronTexaco mitt í hjartanum á hesum øki. Í oljuídnaðinum er tí sera stórur áhugi fyri hesi boringini, sum kann – um hon er eitt lønandi fund – birta nýtt lív í aftur oljuvónirnar á øllum Atlantsmótinum.

Uppá fyrispurning um felagið hevur handlað data frá øðrum feløgum, sum hava borað í økinum sigur tíðindakvinnan hjá feløgnum, at tað hava tey ikki. Felagið fylgir annars eisini komandi boringini hjá Agip á føroyskum øki við áhuga.

Hóast talan er um ein brunn í bretskum øki so meta oljufeløgini, eisini tey, sum eru virkan á føroyska landgrunninum, júst hesa boring sum av stórum týdningi eisini fyri teirra arbeiðið í framtíðini. Bert góðar tveir mánaðir eftir at hesin brunnurin er boraður setur Agip borin í okkara megin markið. Tvs. At her eru tveir brunnar, sum kunnu fáa kollveltandi týdning fyri alt økið. Úrslitið av brunnunum verður helst tøkt einaferð í summar. (Á kortinum á síðu 15 sæst, hvar ChevronTexaco skal bora beint við markið. Felagið hevur fleiri teigar norður framvið markinum) Δ

# turin má loysast



*Herálvur Joensen, aðalstjóri í Oljumálaráðnum greiðir føroyingum í Bretlandi frá føroysku oljutilgongdini*
*Mynd Jan Müller*

*Framhald av síðu 14*

viðurskiftini kunnu vera øðrvísi á teirra øki, sjálvt um tað er bara nakrar kilometrar burtur frá har BP boraði. Vit kunnu so ikki gera nakað annað enn at krossa fingrar fyri teimum.

## 2. útbjóðing nærkast

Herálvur Joensen vísti annars á, at tað, sum síðani liggur í kortunum hjá okkum er at tilrættaleggja næstu útbjóðing. Hann vísti á øki, sum altjóða oljuídnaðurin í 98 peikaði á, sum kundu vera áhugaverd.

Økini vestan fyri á landgrunninum eru uppá stutt sikt torfør at fara eftir, tí har er nógv basalt. Tað verður tí neyvan her man fer uppá stutt sikt. -Samskiftið vit hava við loyvishavararnar á føroyskum øki bendir á, at økini ídnaðurin fer at fokusera uppá komandi tíðina verða frá verandi loyvunum í landsynningshorninum og so norðureftir, bæði upp framvið Hetlandsrennuni men kanska eisini eitt sindur inn á økini, har t.d. Statoil hevur 9 ára loyvi tvs. inn í basalttrupulleikarnar.

So tað at loysa basaltknútin er tann stóra avbjóðingin í føroyskum oljuhøpi, tí stórt sæð allur føroyski landgrunnurin er dekkaður av basalti.

Aðalstjórin í Oljumálaráðnum metti tí, at um landsstýrismaðurin er í góðum lag fer hann í løgtingið við uppskoti um, at ein partur av hesum øki skal bjóðast út. -Tíðarrokningin er tann, at í vár fer partur av teknisku starvsfólkunum at samskifta við oljuvinnuna um eitt komandi útbjóðingarumfar. Um áhugin vísir seg at vera til steðar kann tað henda, at vit longu í heyst biðja feløgini peika út øki. Men vit vita út frá samrøðum við feløgini, hvar áhugin er, so tað kann vera, at nominatiónin verður lopin um og verður farið beinleiðis til útbjóðingina.

Men landsstýrismaðurin skal so í tingið við hesum og gongur alt sum ætlað kunnu vit á heysti 2004 veita tey næstu loyvini.

## 9 ára loyvini

Sosialurin skilur annars, Oljumálaráðið so smátt er farið undir at samráðast við feløgini, sum hava 9 ára loyvi. Hesi feløgini skulu innan tríggjar mánaðir geva Oljumálaráðnum eina frágreiðing um, hvat tey ætla víðari við sínum 9 ára loyvum. Talan er um Anadarko, Agip og Statoil. Sambart treytunum skulu feløgini gera av, um tey vilja fara undir at bora í hesum loyvunum nakað áðrenn 17. august. Tað kann henda, at feløgini ella einstøk feløg fara at koma við áheitanum um at fáa útsett avgerðina um at bora í eitt ár ella so, soleiðis at tey fáa gjørt fleiri kanningar og harvið betur kunnu gera av nær og hvar tey kunnu seta borin í. 9 ára loyvini liggja inni á basaltøkjum.

Keldur Sosialurin hevur tosað við halda, at nú tað er so umráðandi at fáa sett hol á basaltið er ikki óhugsandi, at feløg, sum hava 6 og/ella 9 ára loyvi kunnu fara hvør sær ella saman um at gera eina boring inni á basaltinum, og av tí hon vil vera sera váðilig seta tey kanska sítt álit á, at krøvini frá myndugleikunum verða linari. Tað er ikki óvanligt aðrastaðni, har oljufeløg hava bundið seg til at bora fleiri brunnar men hava mist trúnna uppá, at olja finst í loyvinum, at tey so fáa møguleika at bora aðrastaðni. Fyri Føroyaøkið kundi tað merkt, at okkurt felag ella feløg, sum vilja átaka sær uppgávuna at seta hol á basaltið vestan fyri verandi loyvisøki, antin sleppa undan onkrum av sínum verandi forpliktilsum ella fáa aðrar treytir at virka undir.

---

Stjóri í felagnum hjá oljufeløgum í Bretlandi:

# Oljufund við Føroyar vil seta Atlantsmót í fokus

OLJULEITING
*Jan Müller*

Herfyri var oljuráðstevna í London, har eitt nú stjórin í UKOOA, James May setti oljuleiting kring Bretland á dagskránna. Sosialurin hitti mannin og spurdu vit hann, hvørjar vónir oljuídnaðurin í Bretlandi hevur til framtíðina hjá Atlantsmótinum tvs. økjunum millum Hetland og Føroyar.

- Eg haldi, at stóru vónirnar, sum komu í kjalarvørrinum á teimum stóru oljufundunum í 90-unum, tá eitt nú 17. útbjóðing gav so nógvar nýggjar leitimøguleikar, gjørdust eitt vónbrot. Men tað eru framvegis fleiri oljufeløg, sum varðveita trúnna uppá, at meiri olja finst í undirgrundini har, og at hon verður funnin fyrr ella seinni. Vit vita longu, at har er bæði gass og olja, men tað fer at taka longri tíð at finna meira, tað fer at kosta meira og feløgini koma at binda seg til fleiri brunnar.

Tað var tann tíð, tá tosað varð um Atlantsmótið sum tann nýggja Norðsjógvin. James May heldur ikki, at hetta hugtakið, nú úrslitini hava verið í lakara lagi, er farið í søguna, men tað hevur ikki sama týdning longur. Fyri 5-10 árum síðani var tað beint øvugt, tí bæði Foinaven og Schiehallion fundini skaptu stórt bjartskygni.

James May ásannar, at hóast áhugin enn er til steðar, so eru fleiri oljufeløg farin aðrastaðni at brúka sínar pengar, men tað eru so eisini komin nýggj feløg inn í økið. – Tað skal bara gerast eitt ella tvey fund fyri at fáa áhugan at vaksa aftur.

James May eins og allir aðrir bretar í oljuvinnuni fylgja við spenningi gongdini á Atlantsmótinum, har ein boring hjá ChevronTexaco stendur fremst á skránni.

Stjórin í UKOOA vísir annars á, at tað gongur væl hjá BP, sum er fyristøðufelag fyri tey bæði framleiðandi feltini á Atlantsmótinum, Foinaven og Schiehallion. Bæði



*James May, stjóri: -Eitt fund við Føroyar vil hava stóran týdning fyri alt Atlantsmótið*
*Mynd Jan Müller*

feltini framleiða væl og arbeitt verður nú við at byggja út ein part av risastóra Clairfeltinum, sum byrjar framleiðslu um eitt ella tvey ár. Annars er uppá tal at fara undir at útbyggja enn eitt felt, Suilven, sum liggur í sama umhvørvi og ikki langt frá føroyska markinum.

So skjótt sum Clair fer at framleiða olju verður talan um at byggja upp ein infrastruktur í økinum við rørleiðingum til lands, helst til Sullom Voe í fyrstu atløgu. Ein infrastrukturur kann fáa sera stóran týdning fyri menningina av økinum.

Hóast tað eru boraðir einir 200 brunnar tilsamans á Atlantsmótinum so heldur James May kortini, at tað sama hevur eisini verið galdandi fyri at skilja jarðfrøðina í øðrum nýggjum økjum sum eitt nú Norðsjógvin ol. Enn er man so ikki komin á mál at skilja jarðfrøðina í øllum hesum stóra økinum millum Hetland og Føroyar.

- Tað eru helst tí bæði einstaklingar og oljufeløg, sum framvegis trúgva uppá, at tað ber til at gera stór olju og gassfund í økinum, men tað fer bara at taka longri tíð.

Tað er greitt, at bretar, sum hava tilknýti til oljuvinnuna, hyggja eisini at hvussu gongur við Føroyar. James May sigur, at verður eitt fund gjørt á føroyskum øki í ár ella næsta ár, so fer tað heilt givið at hava sera positiva ávirkan á leitingina á bretskum øki eisini. Tað kann koma at seta alt økið í nýtt fokus.

Upp fyrispurning um tað verða nýggjar leitirundir á bretskum øki á Atlantsmótinum í næstu framtíð sigur James May, at tað er greitt, at tað í framtíðini fara at koma útbjóðingar á Atlantsmótinum. Tað er tað hann veit frá DTI, sum stendur fyri útbjóðing.

### Fakta

Á hvørjum ári um hesa tíðina er serstøk oljuvika í London, har oljufólk røða um oljuspurningar í altjóða høpi. Vikan hevur heitið IP Week. IP stendur fyri The Institute of Petroleum.

Eitt av evnunum á oljuvikuni í ár var "UK Upstream Industry: Exploring the Future" og vóru fyrilestrarnir skipaðir í samstarvi við UKOOA, UK Offshore Operators Association, sum er felagsskapurin hjá oljufyristøðufeløgum, sum eru virkin í Bretlandi. Hetta er nakað tað sama sum okkara FOIB.

Millum fyrilestrarhaldararnar yvir hetta fyri eisini føroyingar áhugaverda evnið var James May, sum er stjóri í UKOOA.